

Magnus Debess Madsen heldur, at arbeiði sum ferðaleiðari er eitt framúr spennandi og avbjóðandi arbeiði: - Eg havi hitt eina rúgvu av fólkum, ment meg, upplivað og sæð sera nógv. Somuleiðis fekk eg nógvar góðar vinir og havi enn regluligt samband við fleiri. Eisini lærdi eg nógv, ið eg somuleiðis kann brúka seinni í lívinum – bæði persónliga og innan arbeiðið, sigur Magnus.



*“Ferðafólk halda altíð, at ein ferðaleiðari veit alt 100%. Men í veruleikanum var eg bara ein 21 ára gamal føroyingur, ið skuldi vera á heimavølli í Spania. Innast inni var eg ofta nervøsur.”*



Meðan tú ert á ferðaleiðaraskúla, hevur tú eitt nú møguleika at fara á málskúla ella til fótbóltsdyst á Nou Camp í Barcelona.



Mitt á strondini í Santa Susanna liggur skúlin á einum sera stásiligum hotelli – Hotel Tahiti Playa. Hotellið hevur góðar svimjihyljar, og kømurini hava vesi/bað, telefon, sjónvarp, aircondition og balkong.

*Kasper de Choen, ferðaleiðari og lærari:*

# ØLL VERÐIN ER EITT ARBEIÐSPLÁSS

Hvørt ár fara fleiri hundrað næmingar úr øllum Norðanlondum á ferðaleiðaraskúlan hjá Service & Co, sum liggur í spanska býnum Santa Susanna – einar 70 kilometrar frá Barcelona.

SKÚLIN
**Lív Højsted Horsdal**
**horsdal@sosialurin.fo**

Ferðaleiðaraskúlin hjá Service & Co liggur miðskeiðis í einum feriuparadísi á einum marglætis hotelli í Santa Susanna, Hotel Tahiti Playa. Ferðaleiðaraskeiðið varir 5-6 strævnar vikur og kostar 16.00 krónur. – Tá er vistarhald og ferð úr Danmark íroknað.

Service & Co hevur trý ferðaleiðaraskeið um árið. Í alt sleppa 180 næmingar á hvørt skeiðið á skúlanum, og miðalaldurin er um 22 ár.

**Eingi serlig krøv**

Einastu krøvini, ferðaleiðaraskúlin hjá Service & Co setur næmingunum, eru, at næmingarnir eru 18 ár, duga enskt og til reiðar at arbeiða hart. Men harafturímóti bjóðar skúlin við vissu arbeiði til allar teir góðkendu næmingarnar á skúlanum. Men fyri at verða góðkendur sum ferðaleiðari, skalt tú fyrst klára sjey royndir. Í miðal dumpa 25% av øllum næmingunum á skúlanum. Og tey allar flestu, ið verða góðkend á skúlanum, hava fingið arbeiði innan ein mánað eftir skúlalok og vinna úr 3000-9000 krónur um mánaðin.

**Hart arbeiði**

Hóast ferðaleiðaraskúlin í Santa Susanna ikki bert er turrislig undirvísing á skúlabeinkinum, fáa næmingarnir frá fyrsta degi at vita, at arbeiðið sum ferðaleiðari er annað enn at smyrja sólkrem og eta ís á heitum strondum langt burtur heimanífrá.

– Sum ferðaleiðari skalt tú vera búgvin til at arbeiða hart 24 tímar um samdøgrið, men harafturímóti er øll verðin títt arbeiðspláss, sigur Kasper de Choen, ferðaleiðari og lærari.

**Mennandi arbeiði**

Á ferðaleiðaraskúlanum verður stórur dentur lagdur á at menna seg persónliga og at læra at »selja seg sjálvan«:

– Tað snýr seg í høvuðsheitum um at kenna seg sjálvan, at ráða yvir alskyns støðum og at duga at tulka tekin frá øðrum fólkum. Sum persónur mennir tú teg ótrúliga nógv í so stutta tíð, ferðaleiðaraskeiðið varir, sigur Kasper de Choen og skoytir uppí, at á skeiðnum lærir tú alt um ferðavinnu og tað praktiska og teoretiska, ein ferðaleiðari kemur út fyri í sínum arbeiði:

Undirvísingin á skúlanum byrjar um klokkan níggju hvønn morgun. Eftir avbjóðingarnar fyrrapartin er siestan á skránni, har næmingarnar sjálvir gera av, hvat teir gera – eitt nú ber til at fara oman á strondina at sóla sær, lesa eina bók ella hvíla seg.

Heimasíður í samband við ferðaleiðaraskúlan:
www.guideskole.dk
www.tora.fo

## HVAT ER EIN GÓÐUR FERÐALEIÐARI?

Henda spurningin setti Planet.fo Kasper de Choen, ið er ferðaleiðari og lærari á skúlanum:

Ein góður ferðaleiðari er:

- »service-mindaður«
- opin og virkisfúsur
- dissiplineraður
- fleksibul
- ábyrgdarfullur
- hevur gott yvirlit
- dugir væl at arbeiða í toymi
- dugir væl at arbeiða í stressaðum støðum
- dugir væl at málbera seg

